Toftamenn snávaðu móti niðurflytarunum

Leirvíkingar stríddu seg til triðja stigið. Allan 2. hálvleik spældu teir 10 móti 11

Tað eydnaðist ikki B68 at halda tørn í næstan vónleysa striðnum um meistaraskapin. Móti botnliðnum LÍF, sum fyrr í ár bert hevur megnað at fingið tveir javnleikir móti ÍF, komu toftamenn í øllum storminum í fotbóltsligt ódnarveður.

Nógvi vinurin gjørdi tað næstan ómøguligt at sýna skipaðan leik, og nógva avfallið bøtti ikki um umstøðurnar. Vøllurin var mest átøkur einum kalvabaki.

Tofta yvirvág

Fyrstu minuttirnar var bólturin mest á toftahálvuni. LÍF hevði vindin í ryggin, og teir gjørdu eftir førimuni eina roynd at pressa spælið oman móti málinum hjá Kjartani.

Eftir einar 20 min. fekk B68 skipað leikin. Teir royndu at nýta vallarbreiddina og at hava nógvar millumstatiónir fyri at gera avleveringarnar stuttar og harvið meira neyvar, men lorvikingar vóru knáir at verja, og ongantið var talan um nakran upplagdan málmøguleika allan 1. hálvleik.

At málini fór at koma eftir steðgin tóktist upplagt, tí tá triggir minuttir vóru eftir av fyrra umfarinum rak dómarin, Herman Midjord, Ólav Olsen av vølli. Hesin kundi ikki bara sær, tá hann saman við Jógvan Martini stríddist um ein vandaleysan bólt, men gav honum eitt rættiligt slag í bukin.

Avgerðin var púra røtt, og lorvikingar skulu vera takksamir fyri, at ikki ein afturat reyk út, tá øsing stóðst av dóminum. Hvørki dómari ella linjuverjar tóktust siggja hevnisøk móti toftamenni, og so bleiv spælt 11 móti 10.

Motivatión restar

Men B68 fekk eingi mál undan vindinum. Eftir 20 min. leik spældi Jens Christian Jógvan leysan av Torfinni, sum leyp úr málinum. Jógvan royndi at lyfta upp um hann, men við síðuna av.

Og so arbeiddi klokkan fyri LÍF. Teir gravaðu seg niður í egnum brotsteigi, og B68 megnaði hvørki við langskotsroyndum undan vindinum ella viðeitt tvey kombinatiónum at koma inn um verjuna og fáa hol á.

Ikki fritt var tað, at tú hugsaði um leikararnir vóru nóg motiveraðir. Teir vildu so ógvuliga fegnir, skundaðu sær tá bólturin var úti og so viðari, men alikavæl so manglaði tað síðsta, sum skal til fyri at visa munin á einum liði í toppinum og einum botnliði.


Undarligt, at liðið innanfyri tvær vikur leikar javnleikir móti botnliðunum báðum og inn imillum vinnur á føroyameistarunum í frálíkum dystum. Hetta kundi bent á, at hóast allar royndir, so hava leikararnir ikki megnað at sett seg nóg mikið upp móti liðum, sum í ti stóra samanhanginum kunnu tykjast minni týdningarmikil enn onnur.

Veruleikin er jú tann, at øll vunnin stig telja eins nógv, og m.a. stigtapini móti botnliðunum hava við sær, at B68 á veittra eftir meistaraskapinum og brynja seg út til silvurdystin, sum heldur fram norðuri í Klaksvík sunnudagin.

-nn-

1. deild menn:

B68—LÍF 0—0 (0—0)



Tað var rárasta hending at lorvíkinga vitjaðu í B 68-brotsteiginum
Mynd: *ingi*

Lesarin skrivar:

Oy, oy, oy!!!!! Langt við síðuna av!



Jógvan Arge, Útvarp Føroya. Samandráttur hjá útvarps-frásøgumanninum var misvísandi, heldur Ólavur Klakk

Sitandi umborð á Smyrli á veg aftur til Klaksvíkar aftaná frálíka dystin imillum KÍ og HB, hoyra vit ítróttartíðindini í útvarpinum. Í samandráttinum av dystinum hoyra vit útvarpsmannin siga, at dysturin var javnur, og at HB kundi havt avgjørt hann.

Sum at hoyra eina kinesiska tíðindastovu siga, at eingin er deyður, tá 300 eru deyð. Sum áskoðari til dystin kann eg siga, at KÍ átti hendan dystin sum hann var, tá eitt korter í fyrra hálvleiki er undantikið.

Tað, ið ítróttatíðindini/Jógvan Arge søgdu um dystin, samsvaraði ikki við tað, sum veruliga fór fram.

Ólavur Klakk

1. deild menn

Úrslit

GÍ—B71 1—2 (0—1)
1—0: Páll á Reynatúgvu (31. min.)
1—1: Carsten Clausen (49. min.)
1—2: Eli Hentze (56. min.)

HB—KÍ 2—2 (2—1)
0—1: Olgar Danielsen
1—1: Rói Arting (34. min.)
2—1: Jóannes Jakobsen (44. min.)
2—2: Beinur Poulsen (78. min.)

B68—LÍF 0—0 (0—0)

ÍF—VB 1—1 (1—0)
1—0: Jens Kristian Eldevig (br.) (21. min.)
1—1: Jan Allan Müller (64. min.)

SÍF—B36 3—1 (3—1)
1—0: Jonhard Joensen (9. min.)
2—0: Jonhard JOensen (11. min.)
3—0: Ari Thomassen (29. min.)
3—1: Kári Gullfoss (38. min.)